## Rosebank team fund í Havn

Nógv oljufólk hava vitjað í Havn nú um dagarnar. Talan er um fólk frá einum oljusamtaki, ið er virkið báðumegin markið. Eystan fyri markið finst Rosebankfundið, sum eftir øllum at døma verður útbygt. Hetta fræettir Sosialurin frá keldum í Aberdeen. Somu feløg, Chevron, Statoil, Dong og OMV, umsita eisini leitiloyvið 008 føroysku megin markið. Leitistjórin hjá Chevron segði við Sosialin fyrr í ár, at støða fór at verða tikin til møguliga boring í føroyskum øki í seinasta ársfjórðinginum í ár. Sum skilst hevur fyristøðufelagið Chevron eisini biðið Jarðfeingi um fund í hesum mánaðinum – helst fyri at tosa um 008 loyvið.



*- Tíðin sum fúli og freki sangarin er farin sigur Finnur Jensen, sum nú vil sleppa víðari sum sangskrivari*

# Vónloysið kveikti Sólskinsvísuna

**Ein døpur tíð við drukk og særdum kærleikskenslum gav Finni Jensen íblástur til tekstin í Sólskinsvísu, sum vann stóru sangskrivarakappingina**

SANGKAPPING

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens K. Vang*

- Løtan var ein góður endi á eini ræðuligari tíð, sigur Finnur Jensen, tá hann verður spurdur, hvussu tað kendist at vinna fyrstu virðisløn í stóru sangskrivarakappingini í gjár.

Við »Sólskinsvísu« hevur Finnur Jensen sett orð til eitt lag hjá Høgna Fagraberg - eitt lag, sum kom undan kavi aftur á nýggjárinum, tá lívið hjá unga sangskrivaranum vísti seg frá síni mest døpru síðu.

– Kvinnan, eg elskaði yvir alt, var júst farin frá mær og mítt lív var við at fara í upployssn av ov nógvum drukk. So sangurin er í grundini skrivaður í djúpastu sorg og svárastu neyð, sum ein roynd at koma upp undan aftur, kanska, sigur Finnur Jensen.

### Abbin gav íblástur

Beint í allari neyðini fekk Finnur Jensen eina yrking upp í hondina, sum abbi hansara hevði skrivað fyri eini 70 árum síðani.

Abbi var hopleysur romantikari og hevði skrivað hetta til ommu mína stutt eftir at tey bæði høvdu hitt hvønn annan. Í abbasa útgávu endar yrkingin gott, meðan mín yrking endar syrgiliga. Í so máta er yrkingin eitt dømi um, hvussu kærleikin kann lyfta teg upp á hægstu skýggj, men líka skjótt tveita teg niður í svartasta vónloysi.

Júst hetta tykist eisini at hava hugtikið dómsnevndina, sum millum annað vísti á, at teksturin er um at fara úr eini skuggasíðu og inn í ljósið, at finna kærleika við fyrsta eygnabrái.

### Meir erligur

Við Sólskinsvísu vísir Finnur Jensen seg frá eini heldur øðrvísi síðu enn tann provokerandi og speiski sangarin, sum vit annars kenna hann. Sjálvur hevur Finnur Jensen heldur onki ímóti at flyta seg frá sínum gamla image.

– Eg havi flutt meg rættiliga nógv sum sangskrivari og royni at vera meir erligur. Eg havi onki ímóti provokerandi og heldur freku myndini av mær sjálvum, tí hatta var ein partur av mær, soleiðis, sum eg var tá. Men eg vil ikki vera hangandi fastur í hasum básinum, sigur Finnur Jensen, sum ikki dylir yvir, at hann hevur ambitiónir sum sangskrivari.

– Eg spæli við tankan um at royna meg á singer/songwriter pallinum í USA. Hvat tað verður til, veit man jú ikki, men eg vil ikki sita sum 50 ára gamal og vera beiskur yvir at eg ikki royndi, sigur 26 ára gamli sangskrivarin.

Nú Finnur Jensen hevur vunnið stóru sangskrivarakappingina er upplagt at spyrja, hvat ger sang góðan.

– Lagið skal fyrst og fremst vera so gott og fella so væl í oyra, at øll fáa hug at murra við. Tá lagið rakar okkurt í sjálvt teimum mest ómusikalsku, er tað besta tekini um, at lagið er gott, sigur Finnur Jensen.

**Sólskinsvísa**

*Orð: Finnur Jensen*
*Lag: Høgni Fargraberg*

Sum sólin hægst á lofti vóð
sítt gull mær vildi læna
rann hugmóð gjøgnum merg og blóð
fram til tann dag eg sá hana

*Úr dalsins skugga fram hon steig*
*sum dá úr vársins fløtu*
*og nýljós feldi á mína leið*
*dróg meg í somu løtu*

Hon gav mær alt, hon gav mær seg
at festa í lagnu mína
við aðra sól ei býti eg
tvey eygu, sum míni kína

*Í dalsins skugga burt hon steig*
*sum dá úr vársins fløtu*
*og myrkrið feldi á mína leið*
*á ársins fyrstu løtu*